# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

Kyndil-Stjørnan 18-22 (8-11):

# Stjørnan aftur á odda




*Fyrstu 11 minuttirnar fekk Stjørnan einki mál, men tað eydnaðist teimum kortini at toga sigurin heim við sær úr Havnini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Tá VB ikki spældi, kundi Stjørnan í gjár við sigri á Kyndli yvirtaka oddasessin í Sunset-deildini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Móti framvegis stigaleysa Kyndli var Stjørnan stórfavorittur undan dystinum í gjárkvøldið, men talan gjørdist tó ikki um tann avsmurningin, sum kanska var í væntu.

Kyndil hevði nevnliga sera góðan hug at fylgja við gestunum, sum als ikki vóru til reiðar, tá dysturin byrjaði.

Sjey málleysir minuttir vóru eisini nóg mikið, til at Henrik Gerster brúki grøna kortið, og eftir hetta kom spakuliga gongd á hjá Stjørnuni.

Seinastu minuttirnar undan steðginum eydnaðist eisini hjá gestunum at toga seg framum, og fyrsat korterið eftir steðgin skrædnaði veruliga. Tað merkti, at sigurin hóast alt ikki kom í vanda, og so kundu klaksvíkarkvinnurnar spakuliga flyta tankarnar móti heimferðini. Ferðin á spælinum fór aftur niður, men vandamikið gjørdist hetta tó ongantíð.

Við sigrinum hevur Stjørnan nú eitt stig meira enn VB í kappingini um oddasessin. Stjørnan hevur tó eisini spælt ein dyst meira.

## FAKTA um dystin

**Kyndil-Stjørnan 18-22 (8-11)**
10 min: 3-0
20 min: 7-5
40 min: 10-13
50 min: 12-18
**Málskjúttar**
**Kyndil**: Jacklin Durhuus 8, Beinta Laursen 5(4), Ronja Mikkelsen 2(2), Jórun Ludvig 1, Barbara Egilstrøð 1, Ása Christiansen 1
**Stjørnan**: Durita Christophersen 5(2), Una Olsen 4(1), Durita Mikkelsen 3(2), Anna Kristina Samson 3, Dianne Møller 3, Simona Petersen 2(1), Ella Petersen 1, Durita Ljósstein 1
**Brotskøst**: Kyndil 7, Stjørnan 8
**Útvísingar**: Kyndil 3, Stjørnan 3
**Dómarar**: Hanus Kúrberg & T.J. Thomsen

**Hondbóltur**

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 10 | 8 | - | 1 | - | 1 | 277 | 203 | 74 | 17 |
| 2 VB | 9 | 8 | - | 0 | - | 1 | 257 | 191 | 66 | 16 |
| 3 Tjaldur | 9 | 4 | - | 2 | - | 3 | 235 | 217 | 18 | 10 |
| 4 Neistin | 9 | 3 | - | 3 | - | 3 | 222 | 218 | 4 | 9 |
| 5 StÍF | 9 | 2 | - | 0 | - | 7 | 205 | 264 | -59 | 4 |
| 6 Kyndil | 10 | 0 | - | 0 | - | 10 | 173 | 276 | -103 | 0 |

# StÍF er steypaliðið

**StÍF heldur enn vanliga stílinum í Coca-cola kappingini í hondbólti. Í gjár vunnu strandingar 31-29 á VÍF**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyrsta fjórðingsfinalan í Coca-Cola kappingini hjá monnum varð spæld í gjárkvøldið.

Kanska skuldi VÍF roknast sum favorittur, nú teir hava víst stóra styrki í landskappingini, men steypatraditiónirnar hjá StÍF eru ikki at kimsa at.

Og hesar traditiónir hildu strandingar eisini fast um. Tað eydnaðist nevnliga at vinna dystin 31-29, eftir at VÍF annars var á odda 19-18 í steðginum.

Talan var alla tíðina um ein sera spennandi dyst, men sum ikki einaferð, so mátti VÍF geva skarvin yvir móti júst StÍF í steypakappingini. Nakað ið mest sum er blivið til eitt árligt afturvendandi tiltak hjá vestmenningum.

Fyri StÍF skutu Alexandur Johansen og Rúni Johansen 7 mál í part. Hjá VÍF skeyt Agnar Joensen 8 mál.

Hinir dystirnir í fjórðingsfinaluni hjá monnum í Coca-Cola kappingini verða spældir í annaðkvøld og fríggjavøldið. Í morgin klokkan 20 spæla besta og næst besta manslíðið hjá Kyndli. Fríggjakvøldið klokkan 20 tekur KÍF móti H71, og klokkan 20.30 sama kvøld tekur næst besta liðið hjá H71 móti Neistanum.

## Paul Ince fekk sekkin

**Fyrrverandi Manchester United- og Liverpool-leikarin, Paul Ince, er í dag koyrdur frá sum venjari í Blackburn. Fyrrverandi venjari í felagnum er upp á tal sum avloysari**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Tað varð ikki væl sæð í øllum eygum, tá ið Blackburn í juni setti Paul Ince sum venjara í felagnum. Hann kom til felagið eftir eina tilveru sum venjari hjá Milton Keynes Dons úr triðbestu deildini, og í Blackburn hevur hann staðið seg so illa, at leiðslan í dag valdi at koyra hann frá.

Blackburn liggur í løtuni á næstaftasta plássi í Premier League.

Fyrrverandi venjarin í Blackburn, Graeme Souness, verður nevndur sum ein møguligur avloysari.

## Aðalfundurin verður 21. februar

Fótbóltssambandið hevur nú sett dagfesting á, nær aðalfundurin hjá føroysku fótbóltsfeløgunum verður.

Hesin verður tann 21. februar í hølunum hjá FSF, og fyrst og fremst fevnir skráin um lógarkravdu ásetingarnar.

Millum hesar er eisini val av nevndarlimum, og hesa ferð standa tríggir av starvsnevndarlimunum fyri vali. Niklas á Líðarenda, varaforseti, Niclas Davidsen og Karl Vidtfeldt. Hartil skulu tveir varalimir eisini veljast. Hinir starvsnevndarlimirnir eru Høgni í Stórustovu, forseti, Rúni Heinesen, Magnus á Stongum og Sveinur Tróndarson.

**-mørk**